## Gera meira við bátastevnu

**Vestmanna:** Leygardagin 15. mai verður Vestmanna Ítróttarfelag 65 ár. Í tí sambandi verður meira gjørt burtur úr bátastevnuni, sum hevur verið hildin í Vestmanna seinastu tvey árini.

Á bátastevnuni eru bátar úr øllum landinum komnir til Vestmanna, har fólk hava hugna sær við sangi, tónleiki, og fólk hava gingið borð um borð og reypa. Tiltakið hevur eydnast væl, og í ár verður enn meira gjørt burtur úr við tiltøkum á kaiøkinum og við dansi í ítróttarhøllini.

Skráin fyri bátastevnuna verður kunngjørd í næsta mánaði.

## Leita eftir evnum til virðisløn

Norðurlandaráðið letur í ár fyri tíggundu ferð Náttúru- og umhvørvis-virðislønina. Virðislønin, ið er 350.000 danskar krónur, verður givin til eina privata ella almenna fyritøku, felagsskap ella einstakling, sum hevur víst serligt áræði innan náttúru- og umhvørvisvernd.

Náttúru- og umhvørvisvirðislønin verður í 2004 latin onkrum, sum miðvíst hevur arbeitt ellar arbeiðir fyri at verja norðurlendska havumhvørvið ella hevur givið íkast til verju av hesum.

Øll kunnu innstilla evni til náttúru- og umhvørvisvirðislønina. Ítøkilig innstilling, sum skal skrivast á serstakt oyðiblað, skal vera dómsnevndini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 30. apríl í ár.

Adressan er: Nordisk Råds Natur- og Miljøpris, Den Danske Delegation, Christiansborg, DK-1240 København K, har oyðibløð kunnu fáast, eins og tey kunnu fáast á internetadressuni www.norden.org.

Virðislønin fyri 2004 verður latin í sambandi við fundin hjá Norðurlandaráðnum í Stockholm 1. til 3. november.

## Læra at taka ímóti fólki

12. og 13. mars skipar Samskifti fyri tveimum skeðum í sølu og tænastu. Endamálið við skeiðunum er at geva starvsfólkum nøkur hent amboð, ið gera tað lættari at fáast við sølu og tænastu, og harvið kunnu tey selja meira.

Tá ið skeiðið er liðugt, vita allir luttakararnir um móttøku av viðskiftafólki og onnur sølu- og avgreiðsluviðurskifti. Skeiðið er ætlað øllum, sum selja og veita tænastur ella hava áhuga fyri hesum.

Skeiðið er tríggjar tímar langt og verður í hølunum hjá S&K í Havn. Tilmeldingarfreistin er 10. mars.

## Gráøki skulu burtur

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, og landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, hava tikið stig til at seta ein landsstýrisbólk, sum skal samskipa almenn tilboð til fólk, ið bera brek.

Tann vantandi samskipanin av verandi tilboðum og tiltøkum er ein ótolandi trupulleiki, sum ofta førir til eina sanna oyðimarkargongd frá myndugleika til myndugleika.

Síðani mai 2002 hava fólk í fyrisitingini og umboð fyri MBF arbeitt við at kortleggja gráøkini, sum eru tey øki, ið eingin politiskur myndugleiki tekur sær av, tí tað ikki er greitt, hvør hevur ta endaligu ábyrgdina.

Í landsstýrisbólkinum eru landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum og landsstýrismaðurin í mentamálum fastir limir. Ætlanin er, at aðrir landsstýrismenn skulu luttaka á fundunum, tá hetta gerst neyðugt.

## Suðuroyingar vilja leggja saman

**Suðuroy:** Ein stórur meiriluti av fólki í Suðuroynni vil hava kommunusamanlegging í oynni. Hetta vísir ein kanning, sum Granskingardepilin fyri Økismenning hevur gjørt.

490 av teimum 502, sum tóku lut í kanningini, svaraðu upp á spurningin, um teirra kommuna skal leggja saman við aðrari kommunu. Ein stórur meiriluti av hesum – heili 73,9% – svaraðu ja, at tey hildu, at teirra kommuna eigur at leggja saman við eini aðrari kommunu. 15,5% svaraðu nei, meðan 10,6% søgdu seg ikki vita.

Tað er áhugavert, at meðan fólkið í Suðuroynni er fyri samanleggjum, eru kommunalu politikararnir ímóti.

# Føroyingar høgt í metum á Seyðisfirði

**Á Seyðisfirði fegnast fólk um, at føroyingar valdu at lata ferju teirra sigla higar, tá Smyril byrjaði millumlandasiglingina í 1975**

VITJAN
*Edvard Joensen*


*Jónas Hallgrímsson, umboðsmaður hjá Smyril Line á Seyðisfirði, fegnst um, at føroyingar valdu Seyðisfjørðin til havn hjá fyrst Smyrli og síðan Norrønu á Eysturlandinum*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Seyðisfirði:**
Seyðisfirðingar ivast ikki í, at føroyingar eiga stóran part av æruni av, at lív aftur er í býnum. Seyðsfjørður livnaði uppaftur, tá Smyril í síni tíð byrjaði sigling millum Tórshavn og Seyðisfjørð.

– Tað var avgerðin hjá Strandferðsluni við táverandi stjóranum Tummasi Arabo og landsstýrismanninum Finnboga Isaksen - nú Ísakson, blðm. - saman við framtakshugðaum fólki av Seyðisfirði og her á leið, sum gjørdi, at Seyðisfjørður líkasum kom veruliga aftur á landkortið. Serliga tá hugsað verður um øll tey fremmandu ferðafókini, sum nú hvørt ár koma hendanveg við Norrønu, sigur umboðsmaðurin hjá Smyril Line á Seyðisfirði, Jónas Hallgrímsson.

Hann ger ikki ov lítið av í síni hálovan av føroyingum og tí, ið staðist hevur av samstarvinum millum Seyðisfjørð og føroyingar.

Vit sita inni á avgreiðsluskrivstovuni hjá Smyril Line á Seyðisfirði, har Jónas Hallgrímsson bjóðar hákarl og turran fisk við øllum tí, ið íslendingar halda hoyra til hesar rættir. Turri fiskurin á Seyðisfirði er tann besti í øllum Íslandi, er hann ivlaeysur um.

Tað var lítið virksemi á Seyðisfirði í fyrru helvt av og mitt í sjeytiárunum, sigur Jóna Hallgrímsson. Men tá tað so frættist, at føroyingar høvdu ætlanir um at byrja ein ferjurutu yvir á Eysturlandið, varð av álvara farið undir at ávirka teir til at leggja rutuna á Seyðisfjørðin.

Talan var um tvey pláss, siglast kundi til, sigur hann. Og føroyingar valdu so Seyðisfjørðin fram um Reyðafjørð, sum liggur nakað syðri á Eysturlandinum.

Í dag er lív aftur í býnum, og Seyðisfirðingar síggja fram til, at Norrøna fer at sigla fast um veturin eisini.

– Tað gleddi okkum almikið, tá gjørt varð av, at Norrøna skuldi í fasta vetrarsigling millum Seyðisfjørð og meginlandið, sigur Jónas Hallgrímsson. So mikið størri var vónbrotið eisini hjá okkum, sum hjá øllum øðrum, tá tað frættist, at tað bara gjørdist tann eini túrurin á hesum sinni orsakað av skaðanum, Norrøna fekk. Men vit gleða okkum so mikið meira, til hon kemur aftur, sigur hann.

# Tað gamla fær nýtt lív á Seyðisfirði

**Fleiri av gomlu húsunum á Seyðisfirði eru livnað upp aftur seinnu tíðina. Heldur enn at lata tey enda sum summar føroyskar bygdir við tómum húsum í gomlu bygdunum og nýggjum útjaðara í bønum, hava seyðisfirðingar givið gomlu húsunum bæði lív og sál aftur**

*Edvard Joensen*


*Á Seyðisfirði hava tey dugað væl at fingið lív aftur í gomlu húsini, soleiðis at miðbýurin heldur enn at gerast ein spøkilsisbýur við spildurnýggjum húsum í útjaðaranum er vorðin ein livandi býur við sál og atmosferu*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Seyðisfirði:**
Gomlu veggirnir standa enn út móti vegnum, men innanveggja sjóðar av nýggjum lívi.

Vit eru á Seyðisfirði, her fólk rættiliga eru farin undir at seta gamlar bygningar í stand og brúka teir til bæði vinnuligt og bústaðar endamál.

Eitt dømi um hetta fyritakssemi er Hótel Aldan á Seyðisfirði, sum eini ung hjún, ið nýliga eru komin aftur av lestrarferð í Danmark, hava átikið sær at reka fyri eit felag, sum stovnað er til at reka hotel í bygningunum, sum felagið eigur.

Her er ikki talan um at byggja nýggjan stóran hotelbygning við øllum tí, sum eitt nýmótans hotel »eigur« at hava. Her verður eitt gamalt hús sett í stand at virka sum gisitingarhús, Meginstøð, við fleiri »satelithúsum« rundanum. Og tað riggar óføra væl at hava eitt høvuðshús og so fleiri gistingarhús í grannalagnum.

Enn er bara tað eina húsið gjørt ordiliga liðugt, og tað er ikki hvøuðsbygningurin. Hann er bara umvældur í veghæddini, har matstovan og móttøkan eru. Men tað er so afturfyri rættiliga hugnaligt.

Húsið er gamalt. Frá 1898. Hetta er eitt gamalt norðmanshús. Timburhús, sum er klætt við bylgjublikki og hvíttmálað við stórum, reyðum vindeygum og reyðum taki. Tá tú sært sjálvan bygningin uttan, er ein tann fyrsta samanberingin beinanveg, at hetta líkist rættiliga nógv gamla handlinum hjá Kjølbro í Klaksvík. Stílurin tykist at vera tann sami.

Longur úti í bygdini hevur felagið, sum eigur Hótel Alduna, gjørt eini onnur gomul hús í stand innan. Fullkomuliga frá grundini av eru tey umvæld, og eru nú besta hotel, ynskjast kann.

Og kortini hava tey, sum her hava staðið fyri, klárað at halda tann gamla stílin og gamla andan í húsinum. Innrættað sum tey eru við nýggjum møblum, ið kortini síggja út, sum møblarnir í slíkum herskapshúsum hava sæð út umleið næstseinasta aldarskifti.

Her er av sonnum skilagóð útbygging farin fram, sum hevur alt spildurnýtt fram uttan at hava skatt tað gamla. Heldur hinvegin rættiliga lívað tað uppaftur.

Hetta er tungt tak og hevur kravt nógvar pengar, sum so skulu vinnast inn aftur frá ferðafólki, ið vónandi skulu koma hendanveg, siga ungu vertsfólkini.

Men trúgva upp á tiltakið, og tað er hálvt verkið.



# Eingin avgerð um sambandsformann

**Tingmanning Sambandsfloksins hevur enn ikki viðgjørt formansspurningin, sum skal avgreiðast á landsaðalfundi 26-27. mars, og í løtuni verður bíðað eftir, hvat valfeløgini eru komin fram til**

FORMANSVAL
*Heini í Skorini*



Nakað síðani váttaði tingmaður Sambandsfloksins í Havn, Kaj Leo Johannesen, at hann av álvara umhugsaði at stilla upp á landsaðalfundi Sambandsfloksins seinast í hesum mánaðinum. Suðurstreymoyar sambandsfelag, Føroya Væl, váttaði saman við Norðoya Sambandsfelag, at stuðul teirra fór til Kaj Leo, meðan hini valfeløgini ikki høvdu tikið nakra avgerð um, hvønn tey kundu hugsa sær skal gerast nýggi leiðari floksins.

### Tingmanningin bíðar

Alfred Olsen, virkandi formaður í Sambandsflokkinum, sigur í stuttari viðmerking, at tingmanning floksins enn ikki hevur viðgjørt formansspurningin, og at tingmanningin í løtuni bíðar eftir útmeldingum frá valfeløgunum kring landið.

Hann undirstrikar tó, at spurningurin skjótt skal viðgerast av tinglimunum, og at endamálið við viðgerðini er greitt.

- Vit fara at miðja ímóti at kunna standa saman um eitt formansvalevni, og vónandi verður hetta gjørligt, sigur Alfred Olsen. Hann vil ikki gera viðmerkingar til sín egna leiklut á landsfundinum 26-27. mars í Læraraskúlahøllini í Havn, og fáa vit sostatt ikki at vita, um núverandi formaðurin ætlar at ogna sær sessin permanent.

Enn er Kaj Leo Johannesen sostatt einasti, sum alment hevur boðað frá sínum ætlanum, meðan bíðað verður eftir, hvat valfeløgini og tingmanningin koma til í nærmastu framtíð.

# Ellisakfør aðalfund

AÐALFUNDUR



Leygardagin 6. mars kl. 16 hava Føroya Ellisakfør aðalfund.

Føroya Ellisakfør er felag fyri tey, ið hava alsk til gamlar bilar og motorsúkklur.

Felagið varð stovnað í 1992, og hevur til endamáls at virka fyri áhugamálum hjá nevnda málbólki. Felagið hevur felagshøli yvir við Strond 22 í Havn, men felagið leigar eisini gamla vatnbrunnin undir Gráasteini í Havn, sum er settur í stand soleiðis, at hann kann hýsa akførum undir tryggum – og turrum – umstøðum. Ætlanin við brunninum er at seta á stovn eitt tekniskt fornminnissavn.

Bilasøgan í Føroyum gongur aftur til 6. mai í 1922, tá tann fyrsti bilurin kom til landið – ein Ford TT, lastvognur, sum Johannes Olsen og Júst Sivertsen í Havn keyptu frá Vilhelm Nielsen og Wenzel Petersen, sum høvdu smiðju í Quillingsgarði í Havn.

Formaður í Føroya Ellisakførum er Ingi Justinussen. Hini í nevndini eru: John William Old, Hans Jørn Nielsen, Jens Reinert og Johan Beder.

# Gunnar Mikkelsen í SMS

**Í dag kl 17 fer Gunnar at spæla á pallinum í SMS, har hann eisini fer at skriva autografar. Kl. 18.30 ber til at tjatta við hann á sms.fo**

KONSERT



Vinnarin av »Stjørna í eitt kvøld« og hálvi føroyingurin Gunnar Mikkelsen kemur nú á fyrsta sinni til Føroyar at spæla.Gunnar hevur dugnaligar føroyskar tónleikarar afturat sær, hesir eru Kim Hansen, James Olsen, Jóhannes Á Rógvu Joensen og Jens Marni Hansen.

Fríggjakvøldið fara hann og føroyska manningin at spæla í Eclipse og leygarkvøldið verður stórt dansitiltak í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Men áðrenn hann trínur á pallin í hesum báðum dansistøðunum, fer hann at hita upp á Torginum í SMS. Framførslan í SMS verður fríggjadagin kl. 17.00, og fer hann at framføra nøkur løg "unplugged". Aftaná skrivar hann autografar á pallinum. Og ikki nóg mikið við tí, so ber til hjá øllum føroyingum og útlendigum fyri tann skuld, at tjatta við Gunnar á heimasíðuni hjá SMS, www.sms.fo

Tjattið byrjar kl. 18.30 og varar í umleið ein tíma.

Annar kemur Gunnar út við fløgu í næstum, og á ferðini í Føroyum verða fleiri av nýggju løgum hansara at hoyra. Hann fer tó eisini at framførða kend løg hjá øðrum tónleikarum. Tað er heimskenda plátufelagið Universal ið gevur út fløguna hjá Gunnari.

†

Okkara kæri pápi, verpápi, abbi, langabbi og vinur

**Árnfinnur Helmsdal**

andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 3. mars, 84 ára gamal.

Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Fróði, Egil**
**Poula**

Tey, ið vilja minnast Finn, kunnu lata Pensionistafelagnum í Havn eina gávu, konto í peningastovnunum.


